lógu eitt sindur uttari.

Vit roknaði við, at síggja teir aftur um náttina. Vit gingu skjótari, og tað var mánalýsi. Men vit sóu teir ikki.

Vit koma so til Aberdeen, og har kom eingin Kristianna fram. Tað vóru tá farin fimm skip frá tí, vit fóru úr Føroyum, til vit komu aftur. Hetta var sjálvsagt ræðuligt. Lorvíks Jóannes var abbi Karsten Hansen, landsstýrismann.

## Frásøgnin hjá Doru um Kristionnu

Fyri nøkrum árum síðani hevði FF-blaðið eina longri frásøgn hjá Doru Nielsen av Vatnsoyrum, sum var dóttir Lorvíks-Jóannes, reiðaran á Kristionnu. Hon greiddi soleiðis frá um Kristionnu:

"Pápi átti skip, og eitt av teimum var Kristianna, uppkallað eftir mammu, sum doyði ung. Kristianna var tann upprunaliga Karin, sum Napoleon í Dali keypti úr Peterhead í 1903. Hon æt tá Kate og varð bygd 1879 í Grimsby hjá C. Hodfield og varð merkt 92,4 brt.

Pápi keypti Karina frá Jaspur Hjelm við skeyti frá 14. januar 1917 og gav henni sum sagt navnið Kristianna. Pápi førdi hana fyrstu árini og aftur í 1936 – 38. Annars vóru nógvir góðir menn skiparar á henni.

Knud Lambaa, italienskur konsul og keypmaður í Havn, leigaði Kristonnu at sigla við ísfiski í 1941. Teir gera tveir túrir hetta árið. Tann seinna túrin mynstra teir 28. juli. Tá fara teir yvir á Siglufjørðin at keypa fisk. Teir fingu skjótt uppí lastina, men tað frættist einki frá teimum aftur. Pápi og Kristian beiggi vóru eisini við henda túrin. Kristian var sjómaður, hann hevði bæði lært til motorpassara og skipara, og var altíð við øðrum skipinum hjá pápa, Arizonu og Kristiannu. Pápi var farin til Havnar at heilsa uppá Kristian, tí Kristian slapp ikki til Leirvíkar, tí skipið mátti sigla víðari til Íslands beinanvegin. Tað var Ólavsøkaftan og tað fóru ikki allir menninir við aftur. So pápi ringdi norður til okkara og segði, at hann mátti fara við. Hann hevði tá ikki verið til skips í nøkur ár. Hann hevði jú eisini handil í Lorvík.

Hetta var ein ræðulig tíð í óvissu og ótta, tá einki spurdist um skipið. Sorgin hevði nú eisini rakt familju okkara, sum so mangar aðrar hesi óndu ár."

**Manningin var henda:**
*Halvdan Johannes Joensen*, skipari, Skopun. F. 18.07 1900.
*Poul Jensen*, bestimaður, Tórshavn. F. 14.10 1886.
*Christian Johannes Frants Johannesen*, motorpassari, Leirvík. F. 10.09 1915
*Johannes Johannesen*, Leirvík. F. 14.07 1878.
*Christian Fredrik Hentze*, Skopun. F. 13.06. 1892.
*Ole Christian Hansen*, Skopun. F. 29.12.1894.
*Johannes Reinhold Jacobsen*, Tórshavn. F. 20.12 1920

## Skifta fólk

So komu boð um, at nú skuldi skiftast fólk. Hetta var í september 1941. Tað fóru eisini fleiri aðrir av. Tað var nervarnir hjá teimum, sum ikki toldu hetta lívið, og tað var ikki so løgið. Menn máttu sova í klæðum. Ein var so ræddur, at hann setti seg í bjargingarbátin frá tí, vit sigldu fram við Inverness og til vit komu til Aberdeen.

Men nógvir vildu sleppa við, tí stórur tørvur var á arbeiði. Her máttu familjumenn eisini kom fram um leysar kroppar. Tað var ikki nakar trupulleiki hjá mær at fáa arbeiði. Eg fór aftur í sjakkið hjá Cristian Andreassen, sum arbeiddi fyri eingilskmenninar. Hetta var eitt fast sjakk. Teir vóru umframt Christian eisini Edmund Næs, svigarsonur Vilhelm, sum átti kioskina Aldubáran, Ólavur Djurhuus, pápi Tongla Tummas og Herman í Mykinesi.

Herman var við tann tiltikna túrin við Seaking, tá ið øll heilt vist roknaðu við, at teir vóru burturgingnir. Einki var frætt frá teimum í ein heilan mánaða. Tey avvarðandi høvdu ringt at venja seg við, at maðurin kortini ikki var deyður. Ein kona plagdi aftaná taka til, at "hetta var ta tíðina, tá ið Fríðrik var deyður". Hetta hevur kenst sum ein uppreisn frá deyðum.

Vit vóru eisini við at lossa úti á kajuni. Hetta kundi vera nokk so buldrasligt. Tá ið hesir luftalarmarnir gingu, skuldu vit burtur av kajuni.

Eg minnist, at tá vit lossaðu kolli við góðgæti í, lógu tey ofta so illa í slengini, at tey duttur niður aftur. So tað kom mangur søtur biti niður í lastina aftur! Onkur mundi fylla sær lummarnar.

Eg fór ikki við aftur Normanner. Tá broyttist skipanin soleiðis, at tað vóru mest eldri menn, sum sigldu við ísfiski. Ungir menn sluppu mest sum ikki uppí part.

## Við Thorvald av Oyrabakka

Eg fór við Royndini, har Thorvald Andreassen var skipari. Edmund Jacobsen, pápi Herman, úr Fuglafirði var bestimaður. Hetta var aftaná, at eg hevði gingið á motorpassaraskúla í 1941/42. Petur Dahl, vanliga kallaður Petur próst, tí hann var sonur próstin Jacob Dahl, var lærari. Tað gekk gott. Eg hevði ætlað mær á stýrimansskúla, men eg fekk ikki sýnsprøvan. Tað knípti við sjónini á øðrum eyganum. Tá vóru motorarnir ikki so stórir. Mítt prógv gekk upp til 120 hestar.

Wolfang, beiggi Thorvald, var 1. meistari, og eg var 2. meistari. Upprunaliga var hetta Prinsessan.

Jens Pauli av Reyni hevði keypt hana. Hann hevði gjørt hana í stand, og hetta var fyrsti túrur hjá Thorvaldi sum skipari.

Vit fóru upp á Eysturlandið. Ætlanin var at fiska. Vit royndu eisini nokk so nógv uppi á Norðlandinum. Tað gekk ikki væl at fiska, og vit keyptu fisk í Íslandi uppí skipið heimaftur. Skipið varð síðan selt, so tað gjørdist bert hesin eini túrurin. Thorvald, sum seinni gjørdist rokskipari, byrjaði ikki heilt væl.

## Tætt uppá týskt flogfar

Eg var ongantíð so nær nøkrum týskum flúgvara, sum her suðuri um Háls, tá ið eg var til útróðrar. Eg, Edmund Næs og Herman í Mykinesi vóru farnir á flot og vóru í Skopunarfjørði. Tað var av fínasta veðri. Tá kom ein flúgvari. Hann hevði bumbað vesturi í Vágum. Hann kom suður eftir gjøgnum Hestfjørð, og hann kom beint á okkum. Tað var silvitni og faktisk sást kjølvatni av honum, so lágt fleyg hann. Hann kom beint móti okkum. Vit sóu, at hann veittraði til okkum.

Eg var uppi við Hólman og dyrgdi, tá ið hann slepti hasar bumburnar inni í Sandagerði. Hann kom inn lágt frá Eystnesi av, inn móti Argja høvda. Teir høvdu kanónir standandi bæði eina og aðra staðni, men teir kundu ikki skjóta móti hvørjum øðrum. Teir byrjaðu ikki at skjóta fyrr enn flúgvarin var komin ímóti Havnadali.

Tann gamli hornabóndin, hann var so bangin fyri tí sum stóðst av krígnum. Hann hevði verið í Syðradali í tríggjar mánaðir og var nú á veg heim aftur. Tað var blivið eitt sundir friðarligari í Havn. Hann kemur beint um skarðið, tá kemur flúgvarin beint á hann, og hann var skjótur at venda aftur til Syðradals.

# Manningin á Kristionnu


*Jóannes Johannesen. Leirvík, ið átti "Kristionnu"*


*Hálvdan Joensen, Skopun, skipari*


*Poul Jensen, Tórshavn, bestimaður*


*Christian F. Hansen, Skopun*


*Óla Chr. Hansen, Skopun*


*Chr. Johannesen, Leirvík, motorpassari*


*Jóh. R. Jacobsen, Tórshavn*

**Næstu ferð**
Í komandi parti greiðir Johan frá, hvussu hann takkað verið einum brævi mundi enda á Isle of Man sum krígsfangi. Skipið hann var við kom á svartalista restina av krígnum